# Oddagrein



**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*

# DRÁL KØVIR PRIVATAR MIÐLAR

Tað eru sera áhugaverdir spurningar, sum Sjúrður Skaale setir Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í mentamálinum í sambandi við kringvarpsgjaldið – nú hann spyr, um talan í veruleikanum ikki er um ein kringvarpsskatt.

Sjálvandi skulu vit hava eitt alment kringvarp, sum skal liva upp til tær treytir, sum verða settar í einum public service sáttmála, sum sjálvsagt eigur at verða nógv ambitiøsari, enn verandi sáttmáli. Men vit fara at halda fram við at endurtaka, at tað er so hamrandi órættvíst, at Kringvarp Føroya, við stuðuli frá mentamálaráðharranum, skal vera í beinharðari kapping við okkum privatu miðlar um lýsingarpengar. Hetta hevði ikki gingið í nøkrum øðrum landi við skipaðum kappingarviðurskiftum.

Ein útvarpsstøð sum Rás2 hevur ongan kjans at kappast við tunga almenna Kringvarpið, sum við 80 almennum milliónum í rygginum, kann dustsúgva allan lýsingarmarknaðin. Tað er ógjørligt. Prísútrokningargrundarlagið hjá Kringvarpinum kann als ikki roknast út, tí eingin kann áseta eitt slíkt virði í einum skattafíggjaðum stovni. Tað dugir ein og hvør at síggja, sum bara hevur eitt lítið sindur av innliti í tað at dríva vinnu.

Tað einasta rætta er at vent verður aftur til semjuna, sum mentanarnevndin hjá Løgtinginum gjørdi, um at lýsingarnar í Kringvarpinum skulu burtur. Hesa semju hevur Helena Dam á Neystabø bara ignorerað.

Einki er meira natúrligt, enn at Kringvarpið verður fíggjað yvir skattin. Tað sigur seg sjálvt. Um tað verður beinleiðis á fíggjarlógini sum allir aðrir almennir stovnar, ella tað verður við einum serligum skatti, sum Sjúrður Skaale skjýtur upp, tað kunnu politikararnir so sleppa at keglast um.

Fyri eksistensin hjá privatu miðlunum hevur tað alt at siga, at Kringvarpið fær rímulig kor at virka undir, so stovnurin – við vælsigniilsi frá landsstýriskvinnuni í mentamálum – ikki kvalir hinar miðlarnar í Føroyum, tí tá er lítið vunnið.



Men tað er tað, sum er við at henda. Kringvarp Føroya skal ikki vera ein kappingarneyti hjá øðrum miðlum. Kringvarpið eigur at vera tann stolta fyrimyndin. Men politiska drálið hjá Helenu Dam á Neystabø ger stovnin til ein kommersiellan kynsvilling, sum ikki fær ta barlast, sum ein slíkur mentanarberi hevur uppiborið.

Latið so privatu miðlarnar fáa frið at skapa sítt egna fíggjarliga grundarlag, sum bara byggir á handilsligt virksemi – og tað vita vit av royndum, at tað skal ikki blandast saman við politiskum áhugamálum, tá tað gongur bara galið.

**Tað er ómentað, at Helena ger Kringvarpið kommersielt**

## Ivast í um kringvarpsgjaldið er lógligt



Nú skulu tey, sum ikki vilja rinda kringvarpsgjaldið, prógva, at tey onki tól hava har tað ber til at lurta eftir ella hyggja at Kringvarpinum í.

Sostatt er kringvarpsgjaldið nú ein skattur, sum øll verða kravd at gjalda, heldur Sjúrður Skaale, løgtingsmaður fyri Tjóðveldi.

Hann sipar til, at nú á døgum er helst onki húski, sum ikki hevur eitt radiotól ella alnet.

Hann heldur tí, at hetta gjaldið skal kallast ein skattur.

- Alt annað er óreiðiligt, sigur hann.

Tí hevur hann nú reist spurningin um kringvarpsgjaldið í Løgtinginum, har hann hevur spurt Helenu Dam á Neystabø, sum umsitur Kringvarpið, nakrar spurningar.

Hann vil hava at vita, um landsstýriskvinnan vil viðurkenna, at kringvarpsgjaldið í roynd og veru er ein skattur sum øll verða kravd at rinda, og hann vil eisini hava at vita, um hon heldur, at tað er sosial rættvíst at krevja gjaldið inn sum eitt brúkaragjald.

Løgtingsmaðurin vil eisini hava at vita frá Helenu Dam á Neystabø, um hon heldur, at tað er í samsvari við góðan lóggávusið at nøkur rinda fult gjald, samstundis sum onnur bara rinda ein brotpart.

Landsstýriskvinnan skal eisini svara, um hon sær nakran trupulleika í, at løgfrøðiliga eindin, sum skal rinda kringvarpsgjald, er húski, og at tað sostatt í summum førum er eitt fólk einsamalt, sum skal bera alt gjaldið, men at tað í øðrum húskjum eru fleiri um at býta gjaldið sínamillum.

## Gav dóttrini nevan fleiri ferðir

Føroya Rættur hevur dømt ein pápa fyri at sláa dóttur sína við knýttum neva fleiri ferðir. Men pápin skal ikki inn at sita, tí hann fekk ein treytaðan dóm á tvey ár.

Tað var eitt leygarkvøld í februar í fjør, at pápin gav dóttrini nevan framman á fleiri ferðir. Pápin segði seg einki minnast til hendingina, men rætturin ivaðist ikki í, at hann var sekur og tí varð hann dømdur.

Útvarpið veit at siga, at upplýsingar, sum rætturin fekk um viðurskiftini millum faðir og dóttir gjørdu, at eingin revsing varð ásett, og tí fekk maðurin ein treytaðan dóm í tvey ár. Tað merkir, at pápin ikki skal inn at sita, um hann einki revsivert ger tey bæði næstu árini.



**Finna røttu loysnina í felag**

GUNVÁ VIÐ KELDU
KJAK Á SÍÐU 17



**Nýggjársheilsan frá ÍSF**

PETUR ELIAS PETERSEN
KJAK Á SÍÐU 16

## Jens Marni vitjar Annu



Fríggjakvøldið klokkan 20 fer Anna Faroe aftur at hava konsert í Løkshøll í Runavík.

Áhoyrarar kunnu vænta sær eina stóra og spennandi tónleikaupplivíng, har Anna bæði syngur sangir av fløgu síni, Because I want to, og onnur góð løg.

Tónleikararnir, sum spæla saman við henni, eru:

Hjalti Joensen: Guitar
Høgni Klakkstein: Trummur
Eyðun Johannesen: Bass
Gunnar Guttesen: Keys
Kristina Bærendsen: Kór

Aftrat teimum fer kórið Vox eisini at luttaka, og sum prikkurin yvir i'num kemur Jens Marni Hansen, Planet Award vinnari, á vitjan og syngur saman við Annu.

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*